MENTAMÁLARÁÐIÐ

Føroya Løgting
Tinghúsvegur 1-3
Postrúm 208
110 Tórshavn

Dagfesting: 19. oktober 2009
Tygara ref.:
Máltal: 70-21103/070113 -/38

**Viðv. broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul**

Sum víst á í viðmerkingunum til lógaruppskotið um lestrarstuðul, vóru tíverri ikki stundir at senda uppskotið til hoyringar, áðrenn tað varð lagt fyri Tingið.

Vit hava nú havt hoyringarfund og hava fingið viðmerkingar frá nøkrum pørtum.

Fundarfrásøgn frá hoyringarfundinum og innkomnu hoyringarskrivini verða við hesum send Mentanarnevndini.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Helena Dam á Neystabø
*landsstýriskvinna*

/

Leivur

Harryson

*aðalstjóri*

**Fundarfrágreiðing frá hoyringarfundinum 6. oktober 2009**
**um broyting í lestrarstuðulslógini.**

---

Møtt á fundi:
Fyri Mentamálaráðið: Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, Una Joensen, deildarstjóri og Jørgen Meitelberg, fulltrúi.
Fyri Stuðulsstovnin: Terji á Lakjuni, stjóri og Emil Sørensen, fíggjarfulltrúi.
Fyri innkallaðu hoyringarpartarnar møttu 4 lesandi: 1 umboð fyrri MFS, 1 umboð fyri Fróðskaparsetrið, 1 umboð fyri Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy og 1 umboð fyri Handilsskúlan í Tórshavn.

Eftir framløgurnar hjá landsstýriskvinnuni og Terja á Lakjuni varð orðið frítt til hugskot og viðmerkingar.

Fylgjandi kom fram, ið viðvíkur lógaruppskotinum:
- Funnist verður at, at skúlagjaldsstuðulin í ÚSUN-skipanini verður lækkaður úr kr. 120.000 til kr. 80.000. Serliga óheppið er tað, at lækkingin eisini kemur at raka tey, ið longu eru farin undir lestur.
- Tey lesandi harmast um, at stuðulin ikki verður prístalsjavnaður 1. august 2010, og eru bangin fyri gongdini, nú Landstýrið tvey ár á rað hevur valt ikki at prístalsjavna lestrarstuðulin.

Víst verður annars til viðløgdu tvey hoyringsskriv frá:
- Meginfelag Føroyska Studenta, Føroya Sjúkrarøktarfrøðiskúla, Føroya Læraraskúla, Søgu- og Samfelagsdeildini, Føroyamálsdeildini, Náttúruvísindadeildini og Vinnuháskúlanum.
- Lestrarvegleiðarafelagnum við Holger Arnbjerg.

13. oktober 2009/ Terji á Lakjuni

Til Stuðulstovnurin
Att.Terji

INDSIGELSE til ændringer af ÚSUN –reglerne mv.

1.
Jeg synes som minimum, at dem, der er begyndt på en uddannelse, skal kunne gennemføre den som bekendt på start- eller bevillingstidspunktet!
Så de ikke pludselig skal til at betale 10 - 40.000 ekstra pr.år.
Det vil være urimeligt andet, når de er gået i gang med et uddannelsesforløb på andre præmisser.
2.
Samtidig synes jeg, at det nye, lavere beløb på 100.000/80.000 skal pristalsreguleres, for ellers bliver der tale om endnu en nedsættelse af støtten fremover, da tuition fees/skolepengebeløbet stiger hvert år!
3.
Desuden synes jeg, at dette lavere beløb kun bør gælde for bacheloruddannelserne, for ellers risikerer man, at studenterne ikke tager - de dyrere -masteruddannelser, som ikke en gang alle bachelorerne tager (end)nu!
Derfor foreslår jeg fortsat høj støtte til Masteruddannelserne, som DK med den nye SU-støtteordning til hele master- og kandidateuddannelser støtter med et stort grundbeløb(taxameterpengene for den pågældende uddannelsestype - f.eks. 45.000 -65.000- 85.000 kr. pr. år) således at ÚSUN ikke støtter med mere end 35.000 - max. ca. 75.000 dkr. i realiteten pr. år til Master-/Kandidatudd.
4.
I takt med at stipendiet til ÚSUN nedtrappes fra 120.000 til 80.000 over 2 år burde lånebeløbet samtidig øges så det samlede beløb (legat og lån) fortsat vil være 200.000 kr pr. år
Lånemuligheden skulle ikke belaste de offentlige udgifter i længden, men kan være en god hjælp til studenten i studietiden.

På vejlederes vegne
Holger Arnbjerg
Altjóða Skrivstovan
00298 322065
www.ask.fo.

A

Tórshavn 9. oktober 2009

Viðmerkingar til

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul**

Viðmerkingar til §13 stk.1

Umboð fyri øll føroysk lesandi mótmæla skerjing av ÚSUN. Vit meta, at ein lækking av ÚSUN hevði havt stóra ávirkan á fakliga tilfeingið í Føroyum, tí hon hevði avmarkað møguleikarnar hjá føroyskum lesandi. Ætlaða skerjingin hevði havt við sær stóra ávirkan á, hvat og hvar føroyingar fara at lesa í framtíðini.

Tað er alt avgerandi, at tey, sum longu fáa ÚSUN ikki missa stuðulin. Fylgirnar kunnu verða, at lesandi ikki hava møguleika at gjøgnumføra byrjaða útbúgving, tí fíggjarligu fortreytirnar verða broyttar so nógv, at tað ikki longur fer at bera til hjá teimum at halda fram. Tá er peningurin, ið tey hava fingið frá ÚSUN hini árini burturspiltur.

Ein onnur avleiðing av ætlaðu skerjingini av ÚSUN er, at færri helst fara at taka eina master útbúgving. Sum dømi kann nevnast, at lesandi í Skotlandi fáa pening frá SAAS, men tað er bert fyri fyrstu fýra árini av lesnaðinum. Ynskja tey at taka master, sum í teimum flestu útbúgvingunum har tekur eitt ár omaná tey fyrstu fýra árini, so kosta tær flestu væl omanfyri 80.000 krónur.

Viðmerkingar til § 19 stk. 1, 2

Vit mótmæla, at ÚS ikki verður prístalsjavnaður aftur komandi lestrarár. Vit vóru vitni til somu skerjing fyrr í ár, har vit somuleiðis mótmæltu við teimum grundgevingum, at hetta lættliga kundi gerast ein endurtøka, sum vit síggja úrslitið av í hesum uppskotinum.

Lesandi í Føroyum, verða við ætlaðu skerjing sett í eina tronga støðu, tí livikostnaðurin í samfelagnum hækkar alsamt.

Aðrar viðmerkingar

Í almennu viðmerkingum stendur, at "arbeitt verður við at kanna møguleikarnar fyri, at lesandi í Føroyum kunnu fáa ein botnfrádrátt í skattinum". Vit ynskja, at hetta verður ítøkiliga orðað í broytingaruppskotinum.

Vit meta ikki tað er rímiligt, at ÚSUN stuðulin verður samanborðin við tilsvarandi stuðul í hinum Norðurlondum (sí almennar viðmerkingar). Tað verða áhaldandi gjørdar samanlíkningar millum Føroyar og serliga Danmark í hesum høpi, ofta fyri at vísa á, at føroysk lesandi hava betri fíggjarligar karmar enn lesandi í øðrum londum. Men her gloymir MMR, at útbúgvingarmøguleikarnir í londunum, samanborið verður við, ikki kunnu sammetast við útbúgvingarmøguleikarnar í Føroyum. Hesi lond hava eitt sera gott og breitt útbúgvingartilboð í mun til okkara, so lesandi har hava ofta ikki fyri neyðini at flyta serliga langt fyri at kunna velja júst tann lestur tey ynskja sær. Tí er tað av alstórum týdningi, at vit í Føroyum veita góðar stuðulsmøguleikar, so at føroyska samfelagið hevur væl útbúgvið fólk innan øll øki. Umframt at hava so nógvar útbúgvingarmøguleikar sum til ber her heima. Harafturat taka samanberingarnar ikki hædd fyri, at kostnaðarstøði, bústaðarmøguleikar og annað, t.d. skattafrádráttur er verri í Føroyum enn aðrastaðni.

Skulu Føroyar mennast sum vitanarsamfelag, mótmæla vit, at hesar broytingar verða settar í verk.

Meginfelag Føroyskra Studenta, ráð teirra lesandi á Føroya Sjúkrarøktarfrøðiskúla, Føroya Læraraskúla, Søgu- og Samfelagsdeildini, Føroyamálsdeildini, Náttúruvísindadeildini og Vinnuháskúlanum